## Trælahald í Bretlandi

Ein frágreiðing, sum varð løgd fyri Parlamentið í London í gjár, kemur til ta niðurstøðu, at tey seinastu árini eru meiri enn 5.000 fólk, flestu teirra kvinnur og børn, smuglað til Bretlands, har fleiri enda sum skøkjur og onnur sum biddarar í gøtunum. Í frágreiðingini, sum innanríkisnevndin hjá Parlamentinum hevur biðið um, verður sagt, at nógv av teimum smuglaðu enda sum nútímans trælir, og at tey fáa alt ov lítla hjálp frá almennum myndugleikum. Tøl hjá ST benda á, at umleið 2,5 milliónir fólk eru keypt og seld ímillum lond, og at 80 prosent teirra eru kvinnur og børn.



## Sigur CIA siga ósatt

Forkvinnan í amerikanska Umboðsmannatinginum, Nancy Pelosi, er í øðini, tí tað er komið undan kava, at hon longu í 2002 fekk at vita frá CIA, at fregnartænastan brúkti heldur harðliga framferð, tá hon avhoyrdi fólk, sum vóru undir illgruna fyri yvirgang. Á einum tíðindafundi í gjár helt hon uppá, at hon fekk ikki sannleikan at vita frá CIA í 2002, men at undanfarna stjórnin gjørdi alt fyri at dylja framfrerðina hjá fregnartænastuni. Fleiri republikanskir politikarar vilja vera við, at Nancy Pelosi, sum er dyggur stuðul hjá Barrack Obama, forseta, var vitandi um framferðina hjá CIA-avhoyrarunum. Men tað avsannar hon.

# Katrin blakað úr Mek

**- Pakka taskuna og sig farvæl. Tú skalt heim við fyrsta farti. Hesi vóru boðini til føroysku Katrin Johannessen, sum var AFS-næmingur í Mexico, tá svínakrím breyt út**



*- Alt gekk ikki sum prestur prædikaði, tá 17 ára gamla Katrin Johannessen var skiftisnæmingur í Meksiko. Tá átta mánaðir av tíggju vóru gingnir, breyt svínakrím út í Meksiko, og hetta førdi við sær, at Katrin brádliga varð evakuerað úr Meksiko av AFS*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SVÍNAKRÍM

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Eg bleiv ikki akkurát kedd, men bleiv kanska heldur súr. Eg tímdi ikki at tosa við nakran um tað, og gjørdi bara sum eg varð biðin. Soleiðis greiðir 17 ára gamla Katrin Johannessen frá hennara reaktión, tá hon brádliga fekk boð um at pakka taskuna og siga farvæl, orsakað av útbrotinum av svínakrími í Meksiko.

Í august 2008 fór Katrin Johannessen úr sínum trygga gerandisdegi í Klaksvík út í heim, har hon gekk eini spennandi tíð í møti. Hon hevði søkt, og var sloppin inn sum skiftisnæmingur í Meksiko. Har búði hon í býnum Queretaro, umleið tríggjar tímar við bussi úr Meksiko Býi, og gekk á einum katólskum privatskúla, svarandi til 2.g í Føroyum. Ætlanin var at hon skuldi vera har í 10 mánaðir.

### Missir besta bitan

Alt gekk tó ikki sum prestur prædikaði. Tá átta mánaðir vóru gingnir, breyt svínakrím út í Meksiko, og allur heimurin setti Meksiko í ljósmálan, tá tíðindini bórust at fólk vóru deyð og túsund vóru smittað. Haðani gekk tað skjótt, og dag um dag hækkaði heimsheilsustovnurin tilbúgvingina.

- Eg hevði akkurát veruliga vant meg við at vera har. Tá tú fer sum skiftisnæmingur til eitt fremmant land, so er fyrsta hálva árið rættiliga strævið. Tað er eitt nýtt mál, nýggj fólk og nýtt alt. Tey, sum hava verið skiftisnæmingar fyrr, siga, at tveir teir seinastu mánaðirnir eru teir bestu, og eg skuldi júst fara undir teir. Men nú verður tað av ongum, fortelur Katrin Johannessen.

### Innibyrgd í eina viku

Fríggjadag 24. apríl hoyrdi Katrin fyri fyrstu ferð um svínakrímið. At byrja við hildu tey bara at tað var ein ring influensa. Henda dagin fekk hon at vita at tað var ein álvarslig influensa, og at hon ikki mátti heilsa uppá nakran, soleiðis sum tey vanliga gera í Meksiko, við mussi á kjálkan, og at hon heldur ikki mátti taka í hondina á nøkrum.

- Tey ringdu av AFS kontórinum í Danmark, og søgdu at hetta var ein álvarslig influensa, men at er ikki skuldi vera bangin, tí at tað bara var inni í býnum (Meksiko Býi, blm.), sigur Katrin Johannessen.

Henda sama fríggjadagin gjørdi meksikanska stjórnin